

*Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, hevur lagt frágreiðing um fíggjarpolitikk landsins fyri tingið, sum fer at hava aðalorðaskiftið um frágreiðingina um ikki so langa tíð*

savnsmynd

# Mugu ansa eftir trongum í búskapinum

*Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur nærlistið seinastu frágreiðingina frá Búskaparráðnum, sum m. a. vísir á at neyðugt er at hava eyguni við búskapinum, so at hann trongar koma í. Tá kann avleiðingin vera lønartrýst, meiri prísvøkstur og verri kappingarføri*

Sveinur Tróndarson

Fyrr í ár lat Búskaparráðið frá sær eina várfrágreiðing, sum m. a. staðfesti, at føroyski búskapurin er í støðugari framgongd.

Stígur - ella lítil afturgongd - tyktist vera komin í lønargjaldingarnar í fiskivinnuni, men kortini helt búskaparvøksturin samanlagt fram sætta árið á rað.

Ráðið tendraði tí ávaringarljósini og bað politikkararnar ansa eftir, at ikki ov nógv ferð kemur á búskapin, tí tað kann fáa ógvusligar avleiðingar fyri samfelagið.

Í frágreiðingini til løgtingið um fíggjarpolitikk landsins, sigur Karsten Hansen, at Búskaparráðið mælir til, at seta neyðug tiltøk í verk, longu í vár, um tað skuldi hent, at búskaparvøksturin heldur fram við somu ferð.

– Orsøkin er fram um alt trýstið á arbeiðsmarknaðin. Landskassaavlopið er stórt, gjaldsjavnaavlopið tykist at verða óbroytt, og arbeiðsloysið er næstan burtur. Hetta er sjálvandi at fegnast um, men vandi er fyri, at fløskuhálsar eru um at taka seg upp. Avleiðingarnar kunnu verða lønartrýst, meiri prísvøkstur og verri kappingarføri, stendur í frágreiðingini.

**Pensjónsskipan og toygdar íløgur**

Mátarnir at tálma búskaparvøkstrinum upp á eru sjálvsagt nógvir, men í fyrsta umfari mælir Búskaparráðið til, at tað almenna bíðar við at gera íløgur, ella í øðrum umfari toyggir tær.

Ein annar møguleiki, sum eisini hevur tálmandi ávirkan er ein kravd pensjónsskipan, meðan tað beinleiðis verður mælt frá at nýta skatta- og avgjaldshækkingar til at tálma búskaparliga vøksturin við.

**Leggja óneyðugt trýst á**

Karsten Hansen, landsstýrismaður, sigur í frágreiðingini, at gongdin seinasta árið vísir, at sum støðan er við búskapinum í dag, so vísir gongdin seinasta árið, at sjálvt við lutfalsliga smáum privatum og almennum íløgum, so kemur føroyski arbeiðsmarknaðurin undir trýst.

Tí er neyðugt at arbeiða miðvíst við at skapa rúm í búskapinum. Her kann tað almenna skerja sín eftirspurning, antin við beinleiðis niðurskurði ella við effektiviseringum. Hetta má gerast á ein skipaðan hátt, og tað merkir, at pleniklipparin ikki verður tikin úr skúrinum aftur.

Í komandi bløðum fara vit at hyggja nærri eftir frágreiðingini frá landsstýrismanninum og vit fara eisini at hyggja at teimum tiltøkum, sum búskaparráðið mælir til at brúka.

# Fíggjarpolitikkurin viðgerast

*Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, hevur lagt frágreiðing um fíggjarpolitikk í 2001 og framyvir fyri tingið og aðalorðaskifti verður í næstum*

Sveinur Tróndarson

Samsvarandi grein 51, fjórða stykki í tingskipanini legði Karsten Hansen fyri tingið frágreiðingina um fíggjarpolitikk í 2001 og framyvir.

Talan er um eitt upplegg til hvussu farast skal fram á tí fíggjarpolitiska økinum tey komandi árini, og hetta uppleggið fara tingmenn at viðgera, tá aðalorðaskiftið verður um málið í nærmastu framtíð

**Opinleiki og gjøgnumskygni**

Í innganginum sigur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum, at íblásturin til orðaskifti um fíggjarpolitikk kemur úr Hvítubók, men tilmælini, sum í henni standa eru tó meira umfatandi enn aðalorðaskiftið.

Eitt av endamálunum við orðaskiftinum um landsins fíggjarpolitikk er, at skapa størri gjøgnumskygni og opinleika um fíggjarpolitikkin. Á henda hátt fáa tinglimir høvi til at koma við síni meining um, hvussu fíggjarpolitikkurin skal leggjast til rættis, áðrenn arbeiðið við fíggjarlógaruppskotinum 2001 er komið í gongd. Karmarnir um fíggjarlógaruppskotið eiga tí ikki at koma óvart á nakran tá tað í heyst verður lagt fyri tingið, skrivar Karsten Hansen í innganginum.

Tað, sum Karsten Hansen her vísir á, er beinleiðis í samsvari við tað, sum stóð í Hvítubók um mannagongdir á fíggjarpolitiska økinum.

Hvítabók mælir til, at tann yvirskipaði fíggjarpolitikkurin verður settur til aðalorðaskiftis, áðrenn arbeiðið við fíggjarlógini fer í gongd.

**Langtíðartiltøk**

Frágreiðingin um fíggjarpolitikkin er, sum nevnt omanfyri í fyrsta umfarið ætla sum grundarlag fyri arbeiðinum við fíggjarlógini fyri komandi ár.

Kortini er framtíðin eisini tikin við í frágreiðingina, tí hon vísir eisini á ávís langtíðar tiltøk.

Búskaparráðið lat fyri kortum frágreiðing frá sær, og tann frágreiðingin er eisini tikin við í uppleggið frá landsstýrismanninum.

Frágreiðingin frá Búskaparráðnum vísir á, hvat skal gerast um búskaparligi vøksturin í samfelagnum heldur fram, og m. a. vísir hon á bráðneyðug tiltøk, sum eru til at taka í slíkum føri, samstundis sum hon eisini vísir á ymsar møguleikar fyri langtíðar tiltøkum.



*Tingmenn fáa nú høvi til at seta seg inn í fíggjarpolitikkin hjá samgonguni áðrenn arbeiðið við fíggjarlógini fyri 2001 byrjar*

savnsmynd

# Almenna skuldin alt ov stór

*Føroyski búskapurin er soleiðis háttaður, at okkara mál fyri almenna skuld eiga at vera øðrvísi enn í grannalondum okkara. Búskapurin er so lættur at sára, at neyðugt er at hava so lága almenna skuld, sum tilber*

Sveinur Tróndarson

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum staðfestir í frágreiðingini um fíggjarpoltikk landsins, at almenna skuldin í Føroyum er alt ov stór.

Almenna skuldin, sum í hesum føri umfatar skuldina hjá landskassanum og hjá konnununum, er enn alt ov stór.

Ráðgevandi nevndin leggur dent á, at búskaparpolitikkurin verður lagdur soleiðis til rættis, at almenna skuldin eisini minkar skjótt komandi árini, stendur at lesa í frágreiðingini frá fíggjarmálaráðharranum.

Við tað, at landskassin við lóg er bundin at hava 15 prosent av BTÚ standandi í landsbankanum, er neyðugt, at seta sær hægri mál enn at minka um nettoskuldina, sigur Karsten Hansen.

Í ES-londunum er málið, at almenna skuldin hægst skal vera 60% av BTÚ, men í Caragata álitinum stendur, at skulu Føroyar hava eitt gott kredittvirði, eigur almenna skuldin ikki at verða hægri enn 50%.

Sveiggini í føroyska búskapinum hava verði stór og tí er enn meira neyðugt við einum vælkonsolideraðum almennum sektori.

– Saman við ætlanunum um at gerast minni bundin at Danmark, eru grundgevingar fyri, at málið viðvíkjandi skuldini eigur at vera hægri enn í Danmark, verður sagt.

Harafturat er tað ein trupulleiki, at almenna skuldin í flestu førum er uttanlandsskuld. Umframt at leggja byrðar á landshúsarhaldið, so fer størsti parturin av almennu rentuútgjaldingunum av landinum